## Ike fekk tríggjar dagar

NSÍ hevur nú fingið boð um, at hvør revsingin hjá nigerianska framherjanum, Ikechukwu Onyema er, eftir at hann fekk reytt kort í dystinum móti KÍ.

Talan var um eina ógvusliga hending, tá Niclas Niclasen og Ike rendu saman, og klaksvíkingurin mátti eftir hetta fara skaddur av vøllinum. Og tað er ivasamt, hvørt hann verður tøkur aftur í ár, eru boðini úr Klaksvík.

Kappingarnevndin hjá FSF hevur nú gjørt av, at Ike verður leikbannaður í tríggjar dystir fyri tilburðin. Fyrsti av hesum dystunum var tann móti HB seinastea vikuskiftið, og umframt komandi dystin móti B36 noyðist Ike so eisini at sita uttanfyri, tá NSÍ um eina viku fer á vitjan hjá TB.

-jm

## Ítróttardagur hjá Kyndli

Leygardagin millum klokkan 10 og 14 fer Kyndil at hava stórt ítróttartiltak fyri børn. Hetta verður rópt Ítróttardagur Kyndils, og er ætlanin, at Gundadalshøllin, Høllin á Nabb og Badmintonhøllin allar skulu takast í nýtslu til tiltakið.

Her fáa børn høvi til at taka lut í bóltspølum av ymsum slag saman við fyrstudeildarliðunum hjá Kyndli.

Eftir hetta verður eisini talan um undirhald, har James Olsen og Kim Hansen fara syngja saman við børnunum, umframt at búktalari eisini fer at undirhalda.

Tiltakið er ókeypis hjá luttakarunum, sum einans skulu hava venjingarklæði við sær tá tey koma.

-jm

VB-Skála:

# Skála hugsar ikki um hini

**Við at spæla sítt spæl, uttan at nýta orku til at hugsa um hini úrslitini, royna Skálamenn framhaldandi at halda fast í oddasessinum**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*




*Í fjør gjørdist talan um málleysan javnleik, tá Skála vitjaði hjá VB*

Eftir 19 umfør av Formuladeildini eitur oddaliðið framvegis Skála, og stendur tað til spælararnar á orangju-litta liðnum, so er hetta eisini ein støða, sum stendur við eftir 20. umfarið.

- Vit royna bara at koyra á. Klára vit at vinna okkara dystir, so er tað ikki so nógv annað, sum vit fáa gjørt.

Og tit hugsa ikki um, hvussu úrslitini verða aðrastaðni kring landið?

- Nei. Tað fáa vit ikki brúkt til so nógv.

Soleiðis staðfestir lyklaspælarin hjá Skála, Pauli G. Hansen, nú teir fyrireika seg til at fara til Vágs, har trupult útidystur móti VB bíðar. Ein dystur, sum Skála ongantíð áður hevur vunnið, men hinvegin hava teir broytt so nógv hagtøl hesi bæði seinastu árini, at tað ikki man vera nakað, sum órógvar hópin stórvegis.

Pauli sigur annars, at hjá teimum eru mest sum allir mans tøkir. Einasta ivamálið er Arnold Berg, sum er nakað eymur í knænum, og fríggjadagin var framvegis ikki greitt, hvørt hann fór at spæla.

### Mortan helst tøkur

Í VB hava tey enn vónir um, at tað skal eydnast at flyta liðið væl og virðiliga burtur frá niðastu sessunum. Sigurin hjá KÍ á Sevmýri ber við sær, at tað nú bara eru tvey stig niður til ovaru strikuna, og tað vilja vágbingar fegnir broytar.

Bjarni Johansen - veteranurin á liðnum - staðfestir, at teir eru væl fyri til uppgávuna. Størsta ivamálið sigur hann vera Mortan úr Hørg, sum fekk eina ljóta eftirtackling í landsdystinum mikukvøldið. Í landsliðsleguni varð tá roknað við, at talan ikki var um nakran liðbandsskaða, og tí verður Mortan ivaleyst á lðinum hjá VB, sum skal royna seg móti oddaliðnum.

NSÍ-B36:

# Nú kunnu runavíkingar taka fetið

**Vinnur NSÍ triðja heimadystin á rað, kunnu teir av álvara nærkast toppinum. Men uppgávan móti B36 er á ongan hátt av lættara slagnum**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*




*Helgi L. Petersen staðfestir, at runavíkingarnir skulu hava trý stig, skulu teir gera sær vónir um heiðursmerki í ár*

B36 skal sunnudagin spæla kanska truplasta útidystin av teimum, sum eru eftir av kappingarárinum.

Hóast árstalsfelagið gjøgnum árini hevur havt gott tak á í Runavík, so boðar stigatalvan frá, at talan her er um lið, sum aftur í ár roynir at ota seg heilt upp á toppin. Ein roynd, sum seinasta vikuskiftið sendi HB suður við ongum og av toppinum á stigatalvuni. Nakað sum runavíkingarnir fegnir vilja endurtaka.

- Tá vit byrjaðu eftir summarfrítíðina, høvdu vit ein greiðan setning. Skuldu vit hava nakran møguleika at blanda okkum í heiðursmerkjastríðið, kravdi tað tríggjar sigrar í teimum fyrstu trimum. Nú hava vit so vunnið teir báðar fyrstu, og so fara vit sjálvandi eftir øllum aftur hesaferð. Men lætt verður tað ikki.

Soleiðis staðfestir Helgi L. Petersen hjá NSÍ, tá vit fríggjadagin loddaðu dýpið undan dystinum.

Hann sigur víðari, at runavíkingarnir halda seg vera rættiliga væl fyri til dystin. Sammett við dystin móti HB, verður talan at kalla um sama fólk, umframt at Páll M. Joensen nú aftur er tøkur. Hann er leigaður frá HB, og í leigusáttmálanum hevði HB treytað sær, at hann ikki kundi spæla við móti barndómsfelagnum. Og so er Ikechukwu Onyema framvegis leikbannaður, so heldur ikki hann er tøkur.

### Hvíldir lyklaspælarar

Hjá B36 siga tey, at har eru allir mans til reiðar at fara undan trupla dystinum. Hóast viðhaldsfólkini kanska funnust at, at eingin úr árstalsfelagnum var á vøllinum, tá landsliðið spældi móti Kypros mikukvøldið, so er hetta helst nakað, sum venjarin hjá B36 hálvgum fegnast um. Í øllum førum gav tað lyklaspælarum hjá liðnum nakað av tiltrongdari hvíld, nú dystarskráin hevur verið so tøtt seinastu tíðina.

Størsta ivamálið í B36-hópinum seinastu tíðina hevur verið Herbert í Lon Jacobsen, sum hevur verið úti við skaða í nakrar dystir. Nú er hann tó farin undir venjingarnar aftur, men tá vit fríggjadagin fregnaðust um støðuna, var framvegis óvist, hvørt hann fór at verða partur av hópinum longu sunnudagin.